**Munnligur fyrispurningur til**
**Anniku Olsen, landsstýriskvinnu í Almannamálum**
**um mismun og brot á ST-sáttmálan ísv. eftirlønarlógina**

1. Hví velur landsstýrið, at fleiri samfelagsbólkar verða undantiknir rættin til eftirlønaruppsparing sambært Eftirlønarlógini?
2. Metir landsstýriskvinnan at hetta er rætt?
3. Metir landsstýriskvinnan at undantøkini í §3 í Eftirlønarlógini eru í samsvari við rættindini hjá einstaklingum, ið bera brek, sambært ST-sáttmálanum?
4. Hvør er samlaði kostnaðurin fyri landskassan, um undantøkini verða tikin burtur í Eftirlønarlógini, og hesir bólkar javnsettir við onnur?
5. Fara broytingar at verða framdar, so undantøkini í §3 í Eftirlønarlógini verða tikin burtur?

## Viðmerkingar

Í Eftirlønarlógini, ið landsstýrið er komið við, skulu øll rinda til egna pensjón. Tí verður lógarásett, at arbeiðsgevarar skulu rinda pensjón av allari løn.
Tó hevur landsstýrið valt at undantaka eina røð av føroyingum. Hetta verður ásett í §3 í Eftirlønarlógini. Undantøkini eru fyrst og fremst fyri samfelagsbólkar, sum í forvegin ikki hava bestu pensjónsuppsparingina, og sum við undantakinum fara at verða enn verri stillaði tá umræður pensjón í framtíðini.
Eitt nú er útgjald av dagpeningi vegna sjúku, útgjald sambært lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk, útgjald sambært forsorgarlógini, útgjald frá ALS og Barsilsskipanini, útgjald frá vardum verkstaði og mong onnur. Talan er í høvuðsheitum um samfelagsbólkar, sum í stóran mun hava tørv á, og rætt til, at verða tryggjað eins góð pensjónsviðurskifti, sum aðrir samfelagsbólkar.

ST-sáttmálin fyri fólk, ið bera brek, ásetir hartil, at fólk, ið bera brek skulu hava javnbjóðis rættindi sum onnur í samfelagnum. Eisini Føroyar hava samtykt henda sáttmála, har ásett m.a. verður í 5: at *"Limalondini viðurkenna, at øll fólk eru eins fyri og undir lógini og hava rætt við ongum mismuni til somu verju og sama gagn av lógini."*
Mett verður ikki, at nýggja eftirlønarlógin hjá landsstýrinum livir upp til ásetingarnar í ST-sáttmálanum.

Landsstýriskvinnan hevur hartil áður upplýst, at skal landið rinda eftirløn av lønarlíknandi veitingum, sambært Eftirlønarlógini, vil hetta kosta um 60-70 mió. kr. Um so er, so er hetta ein upphædd, ið landsstýrið eigur at seta av, fyri at tryggja, øllum føroyingum javnbjóðis pensjónskor í sambandi við nýggju Eftirlønarlógina.
Fyri at fáa lýst málið, og fyri at frætta, um ætlanin er at fremja broytingar, verða hesir spurningar settir landsstýriskvinnuni.

Á Løgtingi, 26. november 2013

**Kristina Háfoss**
Løgtingskvinna fyri Tjóðveldi